# Bilar

Nr. 246 • hósdagur • 20. desember 2001 • 75. árg.


# Nýggjur Nissan Primera – premieru í mars



*Tað er ikki nett soleiðis vit kenna Nissan Bluebird. Bilurin hevur smart design, sum ger upp við alla vanahugsan um, hvussu ein Primera plagar at síggja út*



*Sum stationvognur er Primera elegantur. Aftan minnir hann ikki sørt um Renault Laguna stationvognin*



*Trý rund instrument í miðuni á instrumentborðinum. Konsollin í miðjuni er designað sum eitt teldu-knappaborð*



*Aftan tekur Primera seg væl út. Bilurin fæst við einum sjónvarpsskýggja sum vísir hvat flytir seg aftan fyri bilin*

**Nissan Primera, ið avloysti Bluebird í sínari tíð, kemur nú við einum heilt nýggjum modelli, ið ger upp við alla vanahugsan um hvussu ein Primera plagar at síggja út**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Bæði innan og uttan er nýggi Primera ein smartur bilur, sum kemur at gera um seg millum kappingarneytarnar. Bilurin er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform og er nakað størri enn forgangarin. Størsta broytingin innan er at instrumentini eru í miðjuni á instrumentborðinum, og allar funktiónirnar eru eisini í eini konsoll í miðjuni.

### Fýra motorstøddir

Fýra ymiskir motorar verða at velja ímillum: 1.6 ltr.16V við 109 hk, 1.8 ltr. 16V við 116 hk, 2.0 ltr.16V við 140 hk og ein 2,2 ltr. commonrail dieselmotorur við 126 hk. Teir, sum hava royndarkoyrt dieselmotorin, siga, at hann kraftar sera væl og larmar lítið. Sum tann einasti í sínum klassa kann Primera leverast við fartpiloti, sum altíð heldur røttu frástøðuna til bilin sum koyrir frammanfyri.

### Sedan, stationcar og hatchback

Við nýggja Primera hava Nissan gjørt alt fyri at sameina sportligar og komfortablar koyrieginleikar í einum elegantum bili. Tá Primera kemur á danska marknaðin í mars, verður tað sum sedan og stationvognur, og í august kemur ein hatchback við fimm hurðum. Frá bilasøluni hjá Meinhardt Arge verður sagt, at nýggi Primera verður her hjá okkum um hálvan mars.

## Liðugt við Camaro



Framleiðslan av Chevrolet Camaro, ið hevur verið á marknaðinum í 36 ár, steðgar í 2002. Camaro er ein av amerikansku kappingarneytunum hjá Ford Mustang.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Toyota og PSA í Kekkia



Ætlanin var at Toyota og Peugeot (PSA) skuldu hava eina felags verkætlan í Póllandi. Nú sær út til at hendan bilverksmiðja verður í Kekkia, har teir koma at framleiða 300.000 bilar árliga.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Fiesta í Køln



Framleiðslan av nýggja Ford Fiesta er byrja í Køln í Týsklandi, men bilarnir koma ikki á danska og føroyska marknaðin fyrr enn síðst í 2002.

*Kelda: Motor Magasinet*



ÚT AT KOYRA

# Ferðin er orsøk til flestu ferðsluvanlukkurnar




*Á hesi myndini eru nevndar tær ferðslutrygdarábøtur, sum eru týdningarmiklir tættir til tess at náa null-hugsjónini*




*Ferðin er tann ferðslufaktorur, sum mest er tengdur at deyða og fólkaskaða*

**Lesa vit tíðindabløðini, ið greiða frá ferðsluvanlukkum, síggja vit, at sambært teimum standast ferðsluvanlukkurnar ofta av broti á ferðslulógina, ov nógvari ferð, støðuni hjá bilføraranum, mjørka, kava ella ísi.**

**Spurningurin er, um orsøkin til flestu ferðsluóhappini er manglandi førleiki hjá bilføraranum til at handfara eina hættisliga støðu**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Tað er lætt at síggja, at eingin ferðsluvanlukka hevði verið, um ferðin var null. Við einum sera einfaldum hugsunarúrsliti ber sostatt til at siga, at ferðin - ella í minsta lagi ein óhóskandi ferð - er orsøk til allar ferðsluvanlukkur. Um vit spyrja hví ferðin var óhóskandi, er svarið sum oftast at bilførarin ikki fylgdi teimum reglum, ið vóru galdandi. Eisini tí at ferðin var óhóskandi til tað vánaliga veðrið, koyriumstøðurnar ella annað. Tað eru eingi viðurskifti í ferðslutrygdargranskingini, ið eru so væl skjalprógvað sum sambandið millum ferð og vanlukkutíttleikan.

*Kelda: RFF*

# VR Bilar – selt hundrað bilar fyrsta árið

**VR Bilar, ið umboðað Volvo og Renault bilarnar, bleiv stovnað fyri einum árið síðan. Gongdin hevur verið nógv betur enn væntað, og teir hava longu nú selt hundrað bilar, ið er meira enn tvær ferðir tað sum teir høvdu sett sær sum mál**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tá VR Bilar bleiv stovnað í fjør, settu teir sær sum mál at selja 40 bilar fyrsta árið, seinni varð talið sett til 70, men gongdin bleiv nógv betur enn væntað, og bilur nr. 100, ein Renault Kangoo, er seldur til nýstovnaðu heilsøluna, H.J. Heilsølan, ið selur klæðir til virkir o.a.

### Stór vøruskrá

Síðan teir byrjaðu eru fleiri nýggjheitir komnar á marknaðin, sum til dømis Renault Laguna, og tað at Renault eru komnir við stórari dieselskrá. Umframt at Volvo eisini fást við stórum 5 syl. dieselmotorum við 130 og 163 hk. Annars eru teir mest seldu bilarnir: Renault Mégane, Volvo S40 og S60. Býtið millum av Volvo og Renault er helvt um helvt. Av stórum bilum hava teir selt 6 Volvo lastbilar og ein býbuss. Nýggju Volvo lastbilarnir sum koma á marknaðin komandi ár, fáast við motorum upp til 500 hk.

### Nøgdur við gongdina

Fyri at kunna veita góða tænastu hava teir fingið ein væl útgjørdan hjálparbil, sum hevur alla neyðuga útgerð til at veita bráðfeingis hjálp til lastbilar, bussar og entreprenørar.




*Sverri Steintún, høgru megin, handar her bil nr. 100, ein Renault Kangoo, til Hans Fróða Hansen frá H. J. Heilsøluni*

Tað var 20. november í fjør at persónbila og lastbilaverkstaðurin læt upp, meðan bilasølan byrjaði 1. januar í ár. Stjórin á fyritøkini, Sverri Steintún, er sera væl nøgdur við gongdina higartil.